# BØNARLØTAN

**DESEMBER** **2024** **39. árg.**

## *1. Sunnudagur* *Orðt. 25.1-28*



*Andrias Hansen, Mission Aviation Fellowship, MAF-Føroyar*

Hebron í Leirvík, heimasamkoman hjá Andriasi, hevur sent hann út sum trúboðaraflogskipara við MAF. Hann er 30 ár og vaks upp í Grønlandi, har foreldrini Linda og Jørundur vóru trúboðarar. Andrias hevur útbúgving frá flogskúla í Noregi og Hollandi. Í jan. fer hann fyrst tríggjar mánaðir á bíbliuskúla í Onglandi og síðani til Hollands at arbeiða sum floglærari, til hann síðst í 2025 fer til eitt av teimum 24 londunum, har MAF flýgur, at bera ættarfólkum í avbyrgdum økjum vón, hjálp og evangeliið.
andrias.j.hansen@gmail.com og tel. 919180.

**KRINGVARPIÐ**

1. des. útvarpsmøti, Betesda, Klaksvík
15. des. sjónvarpsmøti, Betania, Porkeri

**EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á www.evr.fo)**
Sunnukv. ............kl. 21…Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21)
Týskv. ................kl. 21....Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

## *2. Mánadagur* *Matt. 27.45-66*

**DANMARK, Kristnastova**
**Ásla og Bárður Norðberg**
**Andrea 4, Boas 2**



Í løtuni koma á leið 60 fólk fríggjakv. og um 80 fólk sunnumorgun. Vit gleðast um hetta. Bæði des. og jan. er próvtøkutíð. Biðið fyri teimum lesandi og samkomuni.

**Susan og Øssur Berghamar**
Fleiri av teimum eldru útisetunum, sum vit hava havt samband við gjøgnum árini, eru farin hiðani, onnur stríðast heilsuliga og megna ikki longur at koma til møti og tiltøk. Veturin kann verða langur og strævin. Ein heilsan og ein uppringing kann hava stóran týdning fyri tey nú um jóltíðir. Latið okkum hava tey í huga og bønum okkara. berghamar@kristnastova.dk

## *3. Týsdagur* *Orðt. 26.1-28*

**OM, LOGOS HOPE, TeenStreet**
Logos Hope er í Barbados til 9. des., í Scarborough á Tobago 10-26. des. og í Port of Spain á Trinidad 26. des.-28. jan.
Doulos Hope er í Subic Bay í Filipsoyggjum til 13. des. og í Kaohsiung á Taivan 17. des. - 14. jan. 12. des. kl. 19 verður missiónsskúlin í Skansahúsinum. Evnið er: *Hvør er mín vitnisburður?* Fyrst í jan. fer Elsa í Skorini, Leirvík, við Logos Hope í 3 mánaðir. Áhugin fyri at fara út í missión økist, og vit fáa alt fleiri áheitanir. Vit eru takksom fyri hetta. *Skurðurin er stórur, men arbeiðsfólk eru fá.*

*Biðið tí hann, sum eigur skurðin, senda fleiri arbeiðsfólk út at heysta skurðin.* Matt. 9.36-38.

**ZAREPTA, samkomulegur.**

## *4. Mikudagur* — *Matt. 28.1-20*

**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 15**

Í okt. byrjaðu vit franskmæltan bíbliuskúla á netinum. Í nov. fyrireika vit eina stevnu fyri leiðsluna hjá Ethnos360 (NTM). Vit eru í løtuni 4-5 fólk, ið reka gistingarhúsið her í Dakar, men okkum tørvar hjálparfólk. Hetta er aftrat vanligu tænastunum. Endamálið er, at næmingarnir úr Vesturafrika skulu fáa venjing at verða trúboðarar. Í løtuni eru 27 næmingar. Biðið, at teir vaksa andaliga, og at tænasta okkara er til signing.



**FØROYAR**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen, Josva 15, Ester 14, Samuel 10**
**– Dora og Niels Pauli Nónstein, Kristina 13**
**– Synnøve og Danjal av Rana, Anna Emilie 10, Lukas 4**

## *5. Hósdagur* — *Orðt. 27.1-27*

**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

Eg undirvísi ein sunnud. í samkomuni, her vit koma, og luttaki í samtalum hvørja viku – uttan jólavikuna – við trúgvandi í Singapor

og Tailandi, sum luttaka í skeiði um Skriftirnar og missiónsvirki. Judy rættlesur og leggur til rættis tilfar til trúboðarar, sum eru í ferð við at stovna samkomur í ættarbólkum kring heimin. Vit verða heima á jólum.

## *6. Fríggjadagur* *Sálm. 24*

**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**
Haldið á at biðja fyri okkum, sum vit rættlesa Jóh. og Op. Vit ætla at gera álmanakkar til komandi ár, ein til Santo Domingo og ein til Saint Andrews. Biðið, at fólkið tekur væl ímóti orði Guds á sínum egna máli.

## *7. Leygardagur* *Heb. 1.1-14*

**Anna og Hans Djurhuus**
Føroyskt møti verður leygardagin 7. des. kl. 19 í Bethaniakirkjuni, Dag Hammarskjøldsgade 2a í Aalborg. Hetta er síðsta møtið í ár. Vit byrja aftur í februar 2025. Biðið fyri møtinum.

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**
Vit takka Gudi fyri eitt gott skúlaár higartil. Bæði Carol og eg hava ábyrgd at undirvísa í ymiskum lærugreinum fyri jól. Minnist næmingarnar, sum hava ymiskar uppgávur, ið skulu latast inn, áðrenn farið verður í jólafrí
.



*Í dag fyllir Anna Emilie av Rana 10 ár

## *8. Sunnudagur* *Orðt. 28.1-28*



**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**

Biðið fyri tænastuni á netinum. FB og annað setur avmarkingar í løtuni. Vit mugu finna aðrar leiðir at náa út, og neyðugt er við marknaðarføring, serstakliga um STEVN skal náa út á enskum. Í løtuni eru nógv jørn í eldinum. Biðið, at Harrin gevur vísdóm at raðfesta.

## *9. Mánadagur* *Heb. 2.1-18*




**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Lydia 7**

Vit síggja nýggj andlit í okkara samkomu. Sara og eg eru partur av nýggjum samkomubólki saman við fleiri teirra. Dóttir okkara Hannah er flutt til Roskilde at læra til gartnara. Miriam er á l'Abri bíbliuskúla í Sveits.

## *10. Týsdagur* *Orðt. 29.1-27*

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 15, Nana 13, Louie 11, Rio 5**

Biðið fyri jólatiltøkum, ið vit hava í *Mama-café, English café, Joy Kids* og í samkomuni í des.. Hetta er gott høvi at fáa andaligt prát.

**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 13, Tabita 10, Debora 9, Natan 6**

## *11. Mikudagur* *Heb. 3.1-19*

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**

Í des. býta vit eitt gott kristiligt blað út til grannar okkara og grannarnar hjá samkomuni. Hetta er trúarvekjandi blað, so biðið, at fólk lesa og opna hjartað fyri boðskapinum undan jólum.

## *12. Hósdagur* *Orðt. 30.1-33*

**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Rebekah 16, Lydia 14**

Trúboðarar fóru styrktir heim aftur frá venjingarleguni í okt. við nýggjum íblástri at byggja stuðulstoymi. Í des. leggja vit ætlanir fyri 2025. Biðið eisini fyri nýggju leiðarunum frá OM, ið Clair vegleiðir, at tey mennast í arbeiðnum.

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

*Í dag fyllir Noah Kristian Joensen 11 ár

## *13. Fríggjadagur* *Sálm. 25*

**GRØNLAND, Juvel II**
**Gull-Britt og Karsten Hansen**

Juvel II skal til 50 ára klassing áðrenn grønlandsferðina í mai 2025. Hetta er bæði krevjandi og kostnaðarmikið. Harrin hevur hjálpt higartil. Biðið at neyðug hjálp og stuðul verður latin endamálinum.



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**



**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**

## *14. Leygardagur* *Heb. 4.1-16*

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Emma Grace 16, Jónatan 15, Markus 12, Evita 9, Joy 7**
Vit leiga buss og fara til árliga jólatiltakið á leguni 14. des. Eftir vitjan í djóragarðinum í Morelia bjóða vit vinum og kenningum til jólatiltakið. Fyrstu viku í jan. hava vit aftur vetrarbíbliuskúla. Biðið, at nógv børn koma og hoyra heimsins bestu søgu.

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**
Jólaveitslur fyri fólk við breki verða 14. og 17. des., tvær jólakonsertir verða 15. des., og jólaaftan verða trý møtir. Biðið, at tiltøkini eydnast væl, og fyri John og øðrum, ið bera gleðiboðskapin, at Harrin signar tey vitjandi, og at fleiri venda sær til Harran.

## *15. Sunnudagur* *Orðt. 31.1-31*

**FØROYAR**
**– Elin og Jógvan Jacobsen**
Vissa byrjar aftur í jan. 2025. Hetta er bíbliuundirvísing fyri ung í 7. fl. hvønn týsmorgun kl. 8 í Ebenezer. Eisini verður lega og eitt kvøld fyri tey ungu saman við foreldrunum.



**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Maria og Jens Bech**

*Í dag fyllir Louie Mortensen 11 ár

## *16. Mánadagur* *Heb. 5.1-14*

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**



Vit hava sýnt filmin *The Passion of the Christ* í seks bygdum í Uganda, og fleiri hava givið Jesusi sítt lív. Eisini vitja vit í fongslum. Biðið fyri kristiligu útvarpstænastuni í landinum og fyri heilsu og trygd okkara.

**FØROYAR**
**– Birgit og Svenning av Lofti**
**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Birita og Petur á Roykheyggi**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Vanja og Svein í Prestgarði, Terji 12, Petra 10**

## *17. Týsdagur* *Rutt 1.1-22*

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

Fólk leggjast aftrat samkomuni hvørja viku. Ivor er upptikin við útbyggingini, og vit vóna at taka bygningin í nýtslu í mars 2025. Vit verða saman við familjuni á jólum. Takk fyri bønir gjøgnum árið.

## 18. *Mikudagur* *Heb. 6.1-20*

**DANMARK, Kolding**
**Anne og Jan Zachariassen**
Vit leita eftir studiohøli í Føroyum. Jens Pauli í Dali og Jan skulu eftir ætlan brúka tað í jan. 2025 í sambandi við arbeiði saman við Deaf Bible Society.

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 11, Micah 11**

## 19. *Hósdagur* *Rutt 2.1-23*

**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**



Tey eru færri, ið nú biðja um nýggja testamenti og aðrar bøkur, helst tí tað ber ikki longur til at lýsa á Facebook og Instagram. Arbeitt verður við hesum. Í 2023 fingu yvir 17.000 turkar pakkar við nýggja testamenti og øðrum bókum.
Uml. 1.300 av hesum luttaka í bíbliuundirvísing í sambandi við brævskeið. Biðið eisini fyri teimum heilt fáu trúgvandi, ið búgva uttan fyri býirnar, at trúgvandi vitja, og at húsbólkar verða stovnaðir.

**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**
Vit takka Harranum fyri leiðslu í 2024. Biðið um vísdóm, nú vit fyrireika okkum til 2025. Nógv er á skránni, eisini ferð til Føroya.

*Í dag fyllir Leah Mortensen 11 ár

## *20. Fríggjadagur* *Sálm. 26*



**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 7, Timon 5, Manuel 0, Salome 0**

Vit eru aftur í PNG og halda nú fram at arbeiða saman við kovolfólkinum. Nakrar gentur eru komnar at stuðla elstu dreingirnar báðar við skúla og barnagarði. Natalie hevur havt nakrar hjartatrupulleikar. Biðið, at vit kunnu halda fram at tæna Harra okkara væl millum kovolfólkið.

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 4, Selah Rose 1**

Biðið fyri okkum, nú vit læra asmatmál og -mentan, og biðið um at vit fáa góð sambond við asmatfólkið.

## *21. Leygardagur* *Heb. 7.1-28*



**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 14, Leah 11, Abigail 6**

Ítróttalegan fyri børn í okt. gekk væl, og ung vórðu eisini andaliga eggjað. Samkoman í Orvault veksur, og alt fleiri luttaka í mánaðarligu sunnudagsmøtunum. Frá jan. hava vit tvey ella trý møti um mán. Okkum tørvar vísdóm og størri høli. Biðið eisini um, at Jóhannis finnur arbeiði, ið sampakkar væl við tænastuna og gevur fíggjarligan stuðul uttan at taka ov nógva orku.

*Í dag fyllir Andrea Norðberg 4 ár

## *22. Sunnudagur* *Rutt 3.1-18*



**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 12, Emma 8**

Jólamøtið 22. des. er vanliga væl vitjað. Jólaaftan bjóðar samkoman einsamøllum at halda jól saman við okkum í samkomusalinum. Biðið fyri hesum.

**ONGLAND, European Christian Mission**
**Dorit og Simon Marshall**

Vit takka Harranum fyri trúfesti. Hann hevur signað, leitt, og givið okkum fólk, ið hava uppihildið okkum í bøn. Gleðilig jól og Harrans signing í komandi ári.

*Í dag fyllir Zephaniah Hansen 4 ár

## *23. Mánadagur* *Heb. 8.1-13*

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 13**



Glarrofólkið í Liberia hevur nú hoyrt um deyða og uppreisn Jesusar fyri fyrstu ferð. Biðið fyri teimum, ið tóku lut í bíbliutímunum, at tey skilja boðskapin, og fyri trúboðaratoyminum. Vit fáa nú eitt pinkubarn til fosturs í samstarvi við bráðfeingisfosturskipanina. Biðið, at Harrin hjálpir og leiðir okkum.

## *24. Jólaaftan* *Rutt 4.1-22*



**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 16, Noah 15, Karis 11, Judah 9, Ethan 6**

Biðið fyri Vincent og Simon, sum teir arbeiða við frálæru úr 1. Kor. Takk, at tit hava biðið fyri Manuelu. Vit hava skilt, at sjúkan kann viðgerast, hóast regluføst viðgerð kann vera ein avbjóðing í PNG.

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

Biðið, at Harrin áhaldandi fremur ein tosta hjá molbogfólkinum at lesa Skriftirnar.

**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 8, Jude 6, Evelyn 4, Olivia 1**

## *25. Jóladagur* *Luk. 2.1-24*



**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Eg rætti kladdurnar til 1. og 2. Kongabók, sum ungi umsetarin hevur týtt, og eg rættlesi NT, sum er umsett aftur til enskt úr badiaranke. Hetta er umráðandi fyri at finna mistøk, áðrenn tað kemur á prent. Biðið fyri hesum drúgva og umfatandi arbeiði.

## *26. 2. Jóladagur* — *Luk. 2.25-52*

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

Tá ið fíggindin leyp á Jesus í Matt. 4, svaraði Frelsarin við orði Guds. Tað eiga vit eisini at gera, um vit eru ung ella gomul. Tað læra vit eisini børnini á legunum. Biðið, at tey elska Guds orð og brúka tað.

## *27. Fríggjadagur* — *Sálm. 27*

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

Uml. 40% av vaksnum dønum búgva í dag einsamallir, eisini samkomufólk. Í Glostrup Frikirke eru alt fleiri støk, ið búgva fyri seg sjálv. Vit vilja, at samkoman eisini skal vera nakað fyri tey.

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Ansa og Arnold Mortensen**
**Ewelina 14**



**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

## *28. Leygardagur* — *Heb. 9.1-28*

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Hanna 16**

Í bygdini Mepiang, sum nýliga hevur hoyrt evangeliið, býr kvinna, sum eitur Norselyn. Hon hevur verið sjúk í gott tvey ár. Hon er rak, heldur seg vera óelskaða og hevur mist lívsvónina. Henni tørvar at

hoyra evangeliið um Jesus og at fáa sjúkuviðgerð.



**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**

Vit fara norður til kankanaey ættarbólkin, so skjótt sum vit fáa visum, men enn bíða vit eftir skjølum til at søkja um visum. Tað eru nú fleiri, ið evangelisera millum síni egnu fólk her, og fleiri koma til trúgv. Heilsan hjá Liz er betri, tó hevur hon dagliga pínu, gongulagið kundi verið betri, men eftir sløttum gongur tað við varsemi. Hjartaliga takk fyri forbønir tykkara, serliga fyri Liz.

## *29. Sunnudagur* — *Heb. 10.1-18*

**OM, SUÐURAFRIKA, Mamelodi Aids Hope**
**Tanja og Kurt Abrahams**
**Hanna 1**



Biðið fyri luttakarunum eftir skúlalok, nú summir fara víðari út í trúboðan, og aðrir fara heim og undir útbúgving. Næsti bólkurin byrjar í feb. Foreldur Kurts koma at vitja. Vónandi fáa vit hvílt og styrkt okkum tá. Takk fyri bøn og stuðul.

**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 12, Noah Kristian 11**

## *30. Mánadagur* — *Heb. 10.19-39*

**Atlantic Mission**

Ætlanin er aftur at gera evangeliseringsferð til Danmarkar – hesa

ferð til Hirtshals. Ferðin verður 11-21. juli 2025 og í samarbeiði við samkomuna Malta í Hirtshals. Nógv ymisk tiltøk verða á skránni, bæði inni og úti, fyri børn, ung og vaksin. Høvi verður at luttaka í verkinum.




| | |
|---|---|
| Útgevari | KBS (Kristniboðssambandið) |
| Blaðnevnd | Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest og Sigurð Ó. Vang. |
| Avgreiðsla | Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057 |
| Uppseting | Grafikmaster, tel. 502022 |
| Myndasavn | info@grafikmaster.fo |
| Prent | Føroyaprent, tel. 314555 |
| Teldupostur | prayerservicefo@gmail.com |
| Heimasíða | www.kbs.fo |

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705


©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!

## NÝGGJ BÓK!

**243 síður 225 kr.**




Hetta er søgan um fimm menn, ið trúfastir søktu Gud í skugganum av útvaldu leiðarum Guds: Áron, Kaleb, Jónatan, Amos og Silas. Hesir fimm svaraðu kalli Guds og tæntu trúfastir uttan at verða viðurkendir ella navnframir. Teir góvu alt tað, teir áttu, og teimum var greitt, at lønina fingu teir helst ikki fyrr enn í tí æviga lívinum. Í ævisøgu teirra er ein avbjóðing til okkara, sum vit ongantíð skulu gloyma. Móses kloyvdi Reyðahav, men í hansara skugga stóð ein maður, sum altíð fer at ímynda stóra høvuðsprest okkara.
Páll á Lakjuni týddi.

THE VERITAS FORUM
www.veritas.org

## GOTT NÝGGJÁR

**Gud, skap í mær reint hjarta! Sálm. 51.12**

FORLAGIÐ LEIRKERIÐ

Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo